

*Yvir 700 fólk vóru á Útoyggjastevnu í Fugloy leygardagin. Her er tað kendi útoyggjarmaðurin, Árni Dahl, ið sigur nøkur orð*
*Mynd: Høgni Thomsen*

verða gjørdar, sum hava við útoyggjarnar at gera, skulu ikki fara fram, fyrrenn Útoyggjafelagið hevur fingið høvi til at siga sína hugsan.

Her hugsar hon kanska einamest um samferðslumál og í hesum sambandi kann nevnast, at tað hevur verið talingur um at einskilja onkrar av teimum smærru rutunum hjá Strandferðsluni til útoyggjarnar.

**Nevndin afturvald**

Á aðalfundinum í felagnum varð annars øll nevndin afturvald.

Í henni sita Óla Jákup úr Dímun úr Dímun, sum er formaður, Olga Biskopstø úr Klaksvík, sum er skrivari og Esbern í Eyðansstovu í Mykinesi er nevndarlimur.

Í Umboðsráðnum hendi ein broyting við tað, at Ragna Glerfoss úr Mikladali fór frá og fyri hana varð Magnus Eliassen úr Mikladali, valdur í ráðið.

# Jógvan Edmund bleiv klippimeistari



*Jógvan Edmund í Geilini kann kalla seg óalmennan føroyameistara í at klippa seyði*

**Hann vann klippikappingina á útoyggjastevnuni í Svínoy leygaragin, men kappingina um at toga tog, vóru vertirnir so ógalantir at vinna á gestunum**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Jógvan Edmund í Geilini í Svínoy er besti seyðaklippari á útoyggj.

Tað fekk hann steyp upp á á útoyggjastevnuni í Fugloy leygardagin.

Eitt av teimum heilt stuttligu og forvitnisligu tiltøkunum á útoyggjastevnuni leygardagin, var ein kapping í at klippa seyð.

Fleiri útoyggjafólk høvdu meldað seg til, bæði mannfólk og konufólk.

Tað var ein avbera stuttlig og spennandi kapping, sum nógv fólk varð og hugdi at. Tá ið avtornaði, var tað svínoyingurin, Jógvan Edmund í Geilini, sum varð meistari. Men tað var í harðari kapping við Óla Jákup úr Dímun og Elisabeth Joensen úr Skúvoy.

Aftyrfyri avrikið fekk vinnarin steyp. Men har skal leggjast afturat, at sjálvandi er tað ymiskt, hvussu seyður er at klippa og tað er eisini ymiskt, hvussu saksarnir eru-tó uttan at taka nakað frá vinnaranum.

**Máttu lúta fyri vertunum**

Eitt annað stuttligt tiltak var, tá ið útoyggjarnar kappaðust um at toga tog og tað var ikki minni spennandi.

Í fjør vunnu dímuningar ferðasteyp, men í ár vístu vertirnir úr Fugloy onga náði, men vóru so óblíðir, at teir vunnu á dímuningum. Kanska høvdu teir tann tiltikna fyrimunin av heimavøllinum, men endaliga úrslitið var so tað, at dímuningar máttu tað tungu gongd at bera fugloyingum ferðasteypið til næsta ár.